# Heini keypt raksturin av Timburhandlinum

**Stjórin í Havnar Timburhandli, Heini Fosaa, hevur stovnað eitt nýtt felag, ið hevur keypt raksturin úr gamla felagnum aftan fyri Havnar Timburhandil**

VINNULÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Partabrøvini í gamla partafelagnum eru niðurskrivað munandi, og niðurskrivingin verður lutfalsliga útgoldin til partaeigararnar. Tilsamans er talan um eini 45 milliónir krónur, ið verða goldnar út.

At tað hevur loyst seg hjá fólki at sett pening í Havnar Timburhandil, er sjón fyri søgn, tí um tú til dømis eigur eitt partabræv áljóðandi 1.000 krónur í fyritøkuni, fært tú nú umleið 45.000 krónur útgoldnar, hóast tú framvegis eigur partabrævið, sum tó hevur fingið minni virði.




*Tá ið henda myndin varð tikin á 75 ára degnum hjá Havnar Timburhandli í 2003, starvaðust fólkini á myndini hjá gamla felagnum aftan fyri fyritøkuna. Nú eru øll starvsfólkini flutt yvir í nýggja felagið hjá Heina Fosaa, sum hevur keypt raksturin frá gamla felagnum*

*savnsmynd*

**Feløgini leys av hvørjum øðrum**

Heini Fosaa váttar, at hann hevur keypt raksturin úr gamla felagnum, og hann leggur afturat, at nýggja felagið hjá honum og gamla felagið hjá Timburhandilin eru fullkomiliga leys av hvørjum øðrum.

– Nýggja felagið hjá mær hevur keypt raksturin. Tað gamla felagið er tó til enn, og tað er eisini virkið, tí tað eigur fyritøkuna Vestpack í Vestmanna. Annars er gamla felagið bert eitt ognarfelagið, sum eigur ymiskar ognir og virðisbrøv, sigur Heini Fosaa.

Tað hevur ljóðað, at Havnar Timburhandil hevur ætlanir um at lata upp deild í Vestmanna, nú Vestmanna Timburhandil er fluttur til Kollafjarðar, men Heini Fosaa sigur, at ongar ítøkiligar ætlanir eru um hetta.

– Vit hyggja okkum sjálvsagt allatíðina um, og Vestmanna er eitt av mongu støðum, ið vit hyggja nærri at. Men vit hava ongar ítøkiligar ætlanir um at lata upp í Vestmanna, sigur Heini Fosaa.





**PROGRAMME**

09.30 – 10.00 **REGISTRATION**

10.00 – 10.10 **WELCOME**
Magni Arge, *Chairman of Faroe Oil Industries' Association*

10.10 – 10.20 **OPENING ADDRESS**
Bjarni Djurholm, *Minister of Trade and Industry*

**Part 1: THE FAROESE CONTINENTAL SHELF**

10.20 – 10.50 **UPS AND DOWNS IN FAROESE CONTINENTAL SHELF EXPLORATION**
Heri Ziska, *Manager G&G, Faroese Geological Survey*

10.50 – 11.20 **STATUS AND PROSPECTS – DRILLING ACTIVITIES IN 2006**
Gareth Allinson, *Exploration Manager Europe, Statoil*

**Part 2: ENERGY AND THE SOCIETY**

11.20 – 11.50 **THE PEAK OIL THEORY – IS IT VALID? WHAT ARE THE CONSEQUENCES?**
Magni Laksafoss, *ph.d. candidate in economics*

11.50 – 13.00 **LUNCH**

13.00 – 13.30 **THE OIL INDUSTRY, NO LONGER THE WHIPPING BOY FOR A WORLD OUT OF CONTROL**
Richard Hardman, *Director, Atlantic Petroleum UK Limited*

13.30 – 14.00 **ELECTRIC POWER WITH SPECIAL REGARD TO RENEWABLE ENERGIES**
Klæmint Weihe, *Director, SEV*

14.00 – 14.20 **SEWAVE – A UNIQUE WAVE ENERGY CONVERTER**
Ólavur Gregersen, *General Manager, SeWave*

14.20 – 14.40 **FAROESE WIND POWER AND PUMP STORAGE SYSTEM**
Jóhan í Niðristovu, *Manager, Røkt*

14.40 – 15.00 **COFFEE**

15.00 – 15.30 **WIND ENERGY – WHAT LIES BEHIND THE DANISH SUCCES?**
Anders Stouge, *Director, Federation of Danish Energy Industries*

15.30 – 16.00 **ENERGY POLICY IN ICELAND AND THE LIBERATION OF ENERGY**
Petur Ørn Sverrisson, *Ministry of Industry and Commerce in Iceland*

16.00 – 16.30 **ENERGY POLICY IN THE FAROES**
Súsanna Sørensen, *Adviser, Faroe Petroleum Administration*

16.30 – 16.40 **CONCLUSION**
Magni Arge, *Chairman of FOIA*

**TILMELDING**

**Seinasta freist at melda til er mánadagin 9. januar 2005.**

Tilmelding er á heimasíðuni www.industry.fo ella á tel. 30 99 00.

Luttøkugjaldið er 750 krónur, 500 krónur fyri limir í Oljuvinnufelagnum.

Verður meldað til seinni enn 9. januar, kostar tað 500 krónur eyka.

REPROZ

Chevron Eni GROUP ATLANTIC AIRWAYS STATOIL SAMTAKIÐ

**OLJUVINNUFELAGIÐ · FAROE OIL INDUSTRIES' ASSOCIATION**
Vinnuhúsið · P.O. Box 1038 · Smærugøta 9a · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 30 99 00 · Fax +298 30 99 01 · www.industry.fo

VINNUHÚSIÐ
House of Industry